# Todi er til reiðar

**Fyrrverandi venjarin hjá Toda Jónsson ivast ikki í, at føroyska álopsessið er til reiðar, tá stórdysturin móti Brøndby verður á skránni sunnudagin**

FÓTBÓLTSPRÁT
*Jákup Mørk*

Ein av mongu áskoðarunum, sum sunnudagin fara í Parkini, kennir fótbóltsleikaran, Toda Jónsson, betri enn tey flestu.

Manne Høgnesen hevur í mong ár verið ein av berandi kreftunum í ungdómsarbeiðinum hjá KÍ, og sum venjari hevði hann í nógv ár gleðina av at hava Todi í leikarahópi sínum. Í árunum frá 1985 til 1989 var Manni venjari hansara, og hann var alt fyri eitt fúsur til eitt lítið prát um piltin, sum nú er størsta føroyska fótbóltsstjørnan.

### Óimponeraður

Og hóast Todi saman við liðfeløgunum var vónbrotin hósdagin, so ivast fyrrverandi venjarin ikki í, at hann fer at verða á toppinum aftur, tá farið verður í gongd sunnudagin.

- Tað eri eg ikki í iva um. Hann hevur altíð verið tann, sum gekk á odda, tá tøk skuldu taka. Ábyrgdarfullur og álítandi og hann kann gerast í øðini, um alt liðið ikki stendur saman, tá á stendur.

Og hóast tað er talan um stóra stórdystin í Danmark við 40.000 fólkum uttan um vøllin, so ivast Manne heldur ikki í, at Todi er maður fyri at spæla væl kortini.

- Tað hevur altíð verið so, at hann bara hevur hugsað um tað, sum fyriferst á vøllinum. Hóast tað onkun tíð kundu vera nóg so nógv fólk og hyggja, tá vit spældu, so var tað ongan tíð nakað, sum hann hugsaði um. Hann var altíð fullkomuliga óimponeraður, og tað verður hann eisini sunnudagin, sigur Manne at enda um leikaran, sum fyri tað mesta spældi á miðvøllinum í yngru deildunum, men sum varð fluttur niðan í álopi, tá koyrilærarin í Klaksvík helt, at evnini vórðu betri gagnnýtt har frammi.



*Tað hevur altíð verið so, at hann bara hevur hugsað um tað, sum fyriferst á vøllinum, sigur Manne, nú Todi skal spæla fyri fullsettari Park*

FCK-venjarin:

# – Eg mátti spara Toda

**– Tað loysir seg ikki at taka nakran kjans, nú Todi endiliga er komin fyri seg aftur. Tí valdi eg Peter Møller fram um, segði Hans Backe**

DONG CUP
*Eyðun Klakstein – Parkin*



*Hans Backe spardi Toda í steypafinaluni, men hann vil ikki siga, um føroyski áleyparin byrjar inni í stórdystinum ímóti Brøndby*

*Mynd: Jonhard Hammer*

Venjarin hjá FC Keypmannahavn gjørdi av at seta Toda Jónsson á beinkin, tá FCK spældi steypafinaluna hósdagin.

– Tað loysir seg ikki at taka nakran kjans, nú Todi endiliga er komin fyri seg aftur. Tí valdi eg Peter Møller fram um Toda til hendan dystin, segði Hans Backe, tá hann hitti pressuna eftir tapið móti OB.

– OB hevur eina sera kropsligt sterka verju, og tað hugsaði eg eisini um, tá eg tók Peter Møller fram um Toda.

1 metur og 90 høgi Peter Møller spældi út til miðskeiðis í seinna hálvleiki, tá Todi kom á vøllin fyri hann. Tá hevði Brøndby-Møller ikki gjørt nógv um seg, men hevði runnið í rangstøðufelluna hjá OB einar fimm ferðir. Hann hevði tó eitt skot á tvørstongina stutt fyri, at hann varð tikin út.

### Avgerðin bíðar

Todi hevur fyrr í ár biðið um at verða spardur til onkran dystin, men tað hevði hann ikki gjørt hesaferð.

Tað var tí avgerðin hjá FCK-venjaranum sum gjørdi, at Todi sat á beinkin meginpartin av tí avgerandi steypadystinum.

– Sjálvandi vildi Todi ikki sparast nú, tí hetta var ein finala. Todi venur nú á hædd við hinar spælararnar, og hann spælir væl, tí vildi eg ikki taka nakran kjans. Eg má eisini hugsa um, at Todi hevur verið nógv skaddur, og at spæla tveir so harðar dystir innan fáar dagar, kann kosta, segði Hans Backe.

– Tað er heldur ikki stórvegis munur millum Toda og Peter Møller. Báðir hava skotið avgerandi mál fyri okkum í ár.

Byrjar Todi so inni ímóti Brøndby sunnudagin?

– Tað kann eg ikki siga. Vit venja fríggjadagin og leygardagin, og aftaná taki eg støðu til tað.

Tað verður tó mett sannlíkt, at Todi verður á vøllinum frá fyrsta bríksli í stórdystinum ímóti Brøndby. Peter Møller gjørdi í øllum førum ikki stórvegis reklamu fyri sær sjálvum í steypafinaluni, meðan Todi hinvegin legði upp til málið hjá FCK.

# Føroyskt íkast í OB

**OB venjarin, Troels Bech, sum er giftur føroyskari konu, hevði ikki væntað, at Peter Møller fór at vera á vøllinum frá fyrsta bríksli**

DONG CUP
*Jákup Mørk - Parkin*

Hóast tað ikki eydnaðist Toda at fáa hendur á steypinum frá DONG, so verður kortini okkurt føroyskt íkast í steypinum.

Troels Bech, venjarain hjá OB, er nevnliga giftur føroyskari konu, so um ikki annað, so verða tað helst føroyskar hendur, sum komandi árið fara at ansa steypinum. Konan hjá Troels er Malan Zachariasen úr Havn.

### Bilsin um Toda

Tá vit eftir dystin hittu Troels, var tað ikki meira, enn at røddin hóraði undan, nú hann í 90 minuttir hevði koyrt á leikarar sínar, men hann gav sær kortini góðar stundir at tosa við føroysku umboðini.

- Sjálvur helt eg, at hatta var ein góður dystur at hyggja at. Ikki minst tá vit so eisini vinna dystin, men eg má tó siga, at nógv verður avgjørt fyrsta korterið ella so. Vit høvdu undan dystinum avtalað, at vit alt fyri eitt skuldu royna at trýsta, men uttan at vit tóku ov nógvar vágar í uppspælinum, so FCK slapp at kontra, og tað má eg bara siga eydnaðist til fulnar.

Um føroyska íkastið til dystin, Toda Jónsson, segði OB-venjarin, at hann var bilsin um, at Todi ikki byrjaði á vøllinum.

- Nú hevði eg helst vitað tað, um eg legði í at lesa morgunbløðini, tí tey vistu jú øll, at Møller skuldi byrja inni á vøllinum. Sjálvur kann eg bara siga, at eg ikki hevði roknað við hesum. Zuma og Todi arbeiða somikið væl saman, og skilja hvønn annan somikið væl, at eg ivaðist ikki í, at teir skuldu byrja í álopinum.

### Einki skerpikjøt í kvøld

At enda, eftir at hava tosað nakað aftur og fram um vinir um kenningar í Føroyum, noyddist OB-venjarin at fara til døgurðan, sum leikarar á báðum liðum skuldu til eftir dystin. Spurdur um tað kanska skuldi verða føroyskur matur á skránni, segði hann at enda skemtandi.

- Tað kann væl vera, at eg havi ilt í búkinum í morgin, men tað verður so neyvan skerpikjøt, sum verður atvoldin til hetta, segði ein flennandi OB-venjari at enda.



*OB venjarin var bilsin um, at Todi Jónsson ikki byrjaði dystin í álopinum*

# hygg & hoyr



**Frá fríggjadegi 10. mai til hósdagin 16. mai**

## Tryggir skúladagar

Eldsløkking, bjarging úr gummibáti, flóta á sjónum og fyrstuhjálp eru bert nakrar av lærugreinunum, sum næmingarnir á Ziskatrø sluppu at royna á einum 4-daga trygdarskeiði á Trygdarmiðstøðini í Klaksvík. Hetta er ein liður í royndini at brynja komandi sjófólk til nýggju krøvini at mynstra umborð á føroyskum skipum. Nú er neyðugt við trygdarprógvi, undantøk verða bert givin eldri sjófólki fram til 1.januar 2003. Ein øðrvísi og spennandi skúlavika stóð fyri framman, tá SvF vitjaði norðuri í størsta fiskivinnubýinum í landinum.

Lagt til rættis: Zacharias Hammer. Klipt: Alexander Gaard Joensen. Fotografur: Zacharias Hammer.




## Gamla apotekið

Hvat hendir í tí gamla bygninginum, har tað einaferð var apotek? Hesin er tann stóri spurningurin, sum hevur herjað um rásir og varp hesa seinastu vikuna. Landsins kosnu eru farnir at »skipa« seg í samgongu, og alt hetta spælið gongur fyri seg á staðnum, har tað altso einaferð var apotek.

Eg gekk satt at siga gjøgnum skránna fyri vikuna fleiri ferðir fyri at vita eftir, um eg ikki hevði gloymt onkra sendingina í vikuni, men gakk, tað hevur fyri tað nógva verið politikkur, val og samráðingar.

Tað er heldur ikki so undarligt, tá hugsað verður um, at hetta er ein avgerandi løtu fyri føroyska fólkið. Hvørja leið skal hetta landið hjá okkum ganga?

Tað er tó nakað undarligt nakað, hetta gamla apotekið. Søgan veit at siga um nógvar og drúgvar samráðingar, ið hava havt sítt at siga fyri landið og fólkið.
Nú kunnu vit so aftur eina ferð seta okkum framman fyri skíggjanum ella leggja oyrað til útvarpstólið fyri at frætta um, hvat og hvussu í teimum innanhýsis dystunum, ið verða leiktir á Gamla Apoteki.

Roynt verður at senda frá bæði innleiðandi umførunum eins endaspælið. Hyggjararnir og lurtararnir skulu heldur ikki snýtast fyri nakað mál.

Leikurin tykist eisini í fleiri førum at vera serføroyskur.

Eina hædd upp, onkur eina hædd niður. Kanska ein túr runt í húsinum og soleiðis gongur hesin politiski valsurin, ið jú hevur verið einasta týdningarmikla punktið á dagsskránni hesa seinastu vikuna. Vit hava eitt verkfall, men tað meira spøkir enn dregur.

Spælið verður spælt á Gamla Apoteki, og so er tað heldur ikki annað enn rímiligt, at mikrofonir og upptøkutól eru tilstaðar.
Tað er tó hvørki høvd ella haliðá hesari skipanini. Sum best ber til kemur onkur politikari við einum úttalilsi og ógvuliga óvinarligu karmarnir fyri miðlarnar – so søguligir sum teir einaferð eru – skapa eitt undarligt umhvørvi til nakrar undarligar dystir.

### Barnavarp

Tað stendur við og versnar. Hetta er eitt orðafelli, sum vit mangan hava lagt oyra til. Sama spor og alt annað enn hækkandi góðsku.

Í so máta var tað eisini hetta, ið eg rætt og slætt hevði roknað við, tá eg kom at tendra fyri útvarpstólinum og barnaútvarp var á skránni. Sjálvur minnist eg, hvussu óføra stuttligt tað var at lurta eftir útvarpinum, men eg kom ongantíð so langt sum at ringja inn.

Men tað eru tað onnur, ið fáa møguleikan til, og eg haldi rætt slætt, at tað kann ikki annað enn frøða ein, tá útvarpið ger tað so gott við hesum yngsta hyggjaraskaranum.

Sendingarnar eru lættar og óivað eisini stuttligar hjá børnunum at lurta eftir. Tað er veruliga alla rós uppiborið soleiðis sum vertirnir megna at fáa nakað burturúr ongum.
Tað vil so siga, at tað er ikki neyðugt við tí heilt stóra aparatinum, men hugflogið ger, at vit fáa spennandi sendingar, ið heilt vist raka rætta plássið hjá málbólkinum. Tá nøkur duga væl at finna uppá, so verður tað skjótt ein fragd. Tað ljóðar gott.

*Heri á Rógvi ummælir:*



### HM

Ikki bara hevur mai mánað higartil megnað at hita okkum nakað stórvegis, og hann hevur eisini verið karmur um politiskan leik. Mai mánað verður eisini mánaðurin, har flestir hyggjararnir byrja at savna seg framman fyri skíggjunum. Tíðin er vorðin búgvin til HM-endaspælið í fótbólti.

Størsta sjónvarpshendingin í heiminum fer av bakkastokki síðst í hesum mánaðinum, og fólk eru farin at leggja frítíðina tilrættis eftir hesum – ella tey áttu.

Kring allan heim fara fólk at sita rúnarbundin frammanfyri skíggjanum, tí her skal nógv henda. Tann sanna hyggjaramentanin rakar eitt nýtt høgt stað teir dagarnar, endaspælið er. Vónandi fáa vit eisini fylgt væl við.

## Fólk og frítíð




## Fres – Býlingshúsið á Ternuryggi




## Botnurin




## Onside Special

